# Fiskiveiðueftirlitið kennir einki til ovfisking

**Ongar kanningar, sum fiskiveiðueftirlitið hevur gjørt, vísa, at russiskir trolarar fiska ov stórar nøgdir av kongafiski, ið føroyskir skiparar annars vilja vera við**

EFTIRLIT
*Stefan í Skorini*



*Brimil tekur sær av fiskiveiðueftirlitinum kring Føroyar saman við Tjaldrinum. Hetta eftirlit hevur ikki víst, at russar fiska ov nógvan kongafisk, sum skiparar annars hava víst á*

Bjarki Berg og aðrir skiparar á djúpvatnstrolarum vilja vera við, at russiskir svartkjaftatrolarar veiða ov nógvan kongafisk undir Føroyum. Hetta hevur við sær, at kongafiskurin hvørvur av teimum leiðum, sum djúpvatnstrolararnir dúva uppá, og sum er teirra fremsta álit í fiskiskapinum.

Elmar Højgaard, stjóri á fiskiveiðueftirlitinum, er tó ikki samdur við skiparunum í hesum uppáhaldi. Hann sigur, at tær kanningar, ið eftirlitið hevur staðið fyri, ikki vísa, at russisku trolararnir hava fingið ov nógvan kongafisk.

– Eg trúgvi ikki, at teir russisku trolararnir fáa so stórar nøgdir av kongafiski, sum ávísir skiparar vilja vera við. Vit hava gjørt nógvar kanningar, men vit hava ongantíð staðfest kongafisk í lastunum og í trolunum hjá teimum, sigur Elmar Højgaard.

Hann vísir samstundis á, at kanningarnar hjá teimum hava verið nøktandi.

– Tað er løgið, at vit ongantíð hava rakt við kongafisk umborð á russiskum skipum, tá vit hava gjørt kanningar. Tí eru vit ivaleysir í, at teir ikki hava stórar nøgdir av kongafiski umborð, sigur stjórin á Fiskiveiðueftirlitinum.

## Fáa einki gjørt

Harafturímóti sigur Elmar, at teir einki kunnu gera við, at russisku trolararnir órógva fiskiskapin hjá føroysku bátunum. Hesum vísir hann ikki aftur, men fær einki gjørt. Trupulleikin er, at føroyingar nýta botntrol og russar flótitrol. Hesir veiðihættir hóska ikki saman, og tí verða bátarnir órógvaðir av hvørjum øðrum.

Higartil í ár hava russisku trolararnir ikki verið nógv í føroyskum sjógvi, og tí hava teir ikki gjørt so nógvar kanningar enn, men tað verður gjørt, nú russarar fara at royna vestanfyri á Mykinesgrunninum.

Bjarki Berg, skipari á Bresti, fílist á, at Fiskiveiðueftirlitið bara ger sínar kanningar um dagin. Hetta gevur ikki eina rætta mynd av veiðuni hjá russum, og tí er neyðugt at gera kanningar um náttina, tá kongafiskurin svimur uppi í sjónum.

Elmar sigur, at teir higartil kanska ikki hava gjørt nóg nógvar kanningar um náttina, men hetta verður gjørt í størri mun í næstum.

– Vit royna altíð at hava tað í huga, sum skiparar og onnur innan fiskivinnuna royna at vísa á.

Tað eru Brimil og Tjaldrið, ið saman við donsku verjuskipunum taka sær av eftirlitinum kring Føroyar.

# Heðin krevur svar uppá frágreiðing



*Heðin Mortensen krevur eina frágreiðing og kanning í sambandi við, at ein frágreiðing hjá Løgtingsskrivstovuni vísir, at hann noktaði at møta á einum fundi í Uttanlandsnevndini, har málið um amerikansk hernaðarfløgfør findu loyvi at nýta føroyskt loftrúm var á skránni*

**Tað er fallið Heðini Mortensen løgtingsmanni fyri bróstið, at Løgtingsskrivstovan hevur almannakunngjørt eina frágreiðing um flogmálið, sum sigur, at Heðin noktaði at møta upp á fundi í Uttanlandsnevndini. Hann vil tí hava svar uppá fleiri spurningar hesum viðvíkjandi**

FLOGMÁLIÐ
*Stefan í Skorini*

Flogmálið tykist ongan enda at fáa. Herfyri varð ein frágreiðing almannakunngjørd, sum segði, at Heðin Mortensen noktaði at møta upp á einum fundi í uttanlandsnevndini. Nevndin skuldi viðgera, um loyvi skuldi gevast amerikanskum flogførum at nýta føroyskt loftrúm í stríðnum móti altjóða yvirgangi.

Fundurin skuldi vera fríggjadagin 5. oktober, og fundarboð vórðu givin hóskvøld. Løgmaður skuldi boða Uttanríkismálaráðnum í Keypmannahavn frá áðrenn klokkan 13 fríggjadag, og tí mátti fundurin vera fríggjamorgunin í seinasta lagi.

Eitt embætisfólk í Løgtingsskrivstovuni skuldi kalla limirnar inn til fundin. Hetta var hóskvøld. Í frágreiðingini sigur embætisfólkið, at Heðin Mortensen noktaði fyri at møta á fundi. Hann vísti til 18 tíma regluni, sum sigur, at limirnir kunnu krevja, at fundur ikki verður hildin fyrr enn 18 tímar eftir, at fundarboð eru givin. Hetta skrivaði Dimmalætting mikudagin.

Heðin Mortensen hevur hildið fast við, at hann ikki varð kunnaður nóg væl um, hvat mál var á skránni. Frágreiðingin hjá embætisfólkinum sigur hinvegin, at Heðin Mortensen varð nóg væl kunnaður um málið.

## Krevur svar

Heðin Mortensen krevur tí svar uppá fleiri spurningar í sambandi við mannagongdir hjá Løgtingsskrivstovuni í slíkum málum. Hann hevur sent Súsonnu Danielsen, stjóra á Løgtingsskrivstovuni, eitt bræv, og hann biðjur hana um eina frágreiðing um mannagongdir og krevur, at ein kanning verður sett í verk av hesum málinum.

Hann vil hava at vita, um løgtingsnevndin ikki skal kunnast um eina slíka frágreiðing, og um viðkomandi løgtingsmaður ikki eigur at hava høvi at úttala seg um hana. Eisini vil hann hava at vita, hvør tekur sær av at almannakunngera slíkar kanningar.

Hann biðjur samstundis Súsonnu Danielsen um at seta í verk eina kanning av, hvat tingmenn fingu at vita í fundarinnkallingini. Nær nevndarlimirnir vórðu uppringdir, hvørji skjøl teir fingu, og hvussu øll henda framferð samsvarar við tingskipanina og vanliga mannagongd í nevndararbeiðnum.

# Fólkatingsvalið ein gáva til tey ríkisfelagsskapssinnaðu

*Gøtu 31.10.01*

**Atli Hansen**

Við at útskriva val til fólkatingið nú hevur Nyrup givið føroyingum ein kærkomnan møguleika fyri at úttala seg um ríkisfelagsskapin fyri seg sjálvan og uttan at hesin spurningurin skal tvinnast so nógv saman við aðrar spurningar til eitt komandi løgtingsval.

Vit minnast øll lyftini frá samgonguni um at einki avgerandi stig skuldi takast á fullveldisleið, uttan at veljarnir sluppu at úttala seg um hetta. Dagurin fyri fólkaatkvøðu varð ásettur, men jú nærri vit komu honum, jú meira ræddist samgongan sín egna skugga og tá ið so ein veljarakanning kundi boða frá, at føroyingar ikki tóku undir við fullveldisætlanini hjá samgonguni, ja, so var hetta eitt kærkomið høvi fyri hana at smoyggja sær burtur úr givnum lyftum og avlýsa fólkaatkvøðuna.

Men nú sleppir hon ikki undan. Nyrup hevur útskrivað eitt fólkatingsval, sum gevur okkum føroyingum møguleika til bæðið at velja okkara fólkatingsumboð og harvið at lýsa okkara meining um fullveldistilgongdia. Og hesum kann hvørki løgmaður ella varaløgmaður leggja forðingar fyri.

Sambandsflokkurin hevur ein greiðan boðskap um okkara viðurskiftir við Danmark og leggur tí eisini stóran dent á at fáa eitt umboð aftur á Fólkatingið. Vit meta, at okkara flokkur vil vera best førur fyri at endurreisa normal og álitisvekjandi viðurskiftir millum ríkisspartarnar aftur.

Men vit vilja eisini loyva okkum at tulka ein dyggan stuðul til Sambandsflokkin sum eina misálitsváttan til fullveldisætlanina hjá sitandi samgongu. Tann dómin, sum føroyingar ikki sluppu at fella við eini fólkaatkvøðu í vár.

Við at stuðla Sambandsflokkin ella eitt av valevnunum ert tú við til at endurreisa nakað av tí, sum henda samgongan hevur sorlað. Ein atkvøða fyri Sambandsflokkin fer at vera ein atkvøða fyri tryggari sigling í ríkisfelagsskapinum.

# ítróttur

Nr. 212 • fríggjadagur • 2. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Todi liðugur í ár

**Føroyski álopsspælarin er farin til Eysturríki fyri at fáa kanna skaða í hælsinuni**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*



*Todi Jónsson stríðist nú við bruna í hælsinuni og er farin til Eysturríki at kanna skaðan*

Tað verður ikki roknað við, at Todi Jónsson kemur aftur á fótbóltsvøllin í hesum árinum.

Danska kappingin endar seinni í november mánaði, og áðrenn tað verður Todi ikki førur fyri at spæla.

Todi er farin til ein serfrøðing í Eysturríki fyri at kanna ein skaða, sum hann hevur fingið í hælsinuna.

Síðst í august mánaði fekk Toda ein vøddaskaða, sum tað skuldi taka nakrar dagar at fáa frískan. Men síðani hevur hann eisini verið plágaður av bruna í hælsinuni.

Endamálið við ferðini til Eysturíki er at kanna skaðan og finna út av, hvat skal gerast við hendan skaðan.

StÍF-H71 29-26 (17-10):

# StÍF steðgaði H71

*H71 tapti annan dystin á rað, tá teir spældu ímóti StÍF mikukvøldið*



**Fyri aðru ferð í fýra dagar taptu hoyvíkingar. Strandingar tvífaldaðu sítt tal á stigum**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

StÍF vann útsetta dystin í móti H71 í høllini á Skála mikukvøldið.

Dysturin var útsettur frá fyrr í ár, og nú StÍF við tveimum stigum í posanum og H71 við seks stigum hittust, endaði tað við sigri til StÍF.

H71 byrjaði kappingina við trimum sigrum á rað, men seinastu dagarnar hava teir taptu tvær ferðir. Fyrst móti Nestanum og nú móti StÍF.

## Strúkandi í fyrra hálvleiki

Longu í hálvleikinum hevði StÍF vunnið sær stóra leiðslu, og fyrra hálva tíman var einki, sum bendi á, at H71 skuldi fara at geva heimaliðnum nakra serliga mótstøðu.

Tað gekk illa hjá hoyvíkingum at bróta ígjøgnum verjuna hjá StíF, men góða álopsspælið hjá strandingum var ov nógv fyri H71-verjuna.

Í hálvleikinum var støðan 17-10 til StÍF, og hóast H71 tók seg eitt sindur saman í seinna hálvleiki, so var munurin millum liðini ov stórur.

H71 minkaði tvær ferðir í seinna hálvleiki leiðsluna hjá StÍF niður í trý mál, men nærri komu teir ikki. StÍF helt seg framman fyri, og tá dysturin var av, vóru júst trý mál á muni millum liðini.

Sigurin merkti, at StÍF tvífaldaði sítt stigatal upp í fýra, meðan H71 annan dystin á rað stendur í stað við seks stigum.

## Dysturin í tølum

**StÍF-H71 29-26 (17-10)**
Málskjúttar:
StÍF: Costin Dumistrescu 8 (3), Marius Joensen 7, Alexander Johansen 4, Jón Rasmussen 3, Artur Johansen 3, Sveinur Justinussen 3, André F. Danielsen 1.
H71: Finnur Hansson 7 (4), Bjarni Wardum 6 (3), Halgir Dahl Olsen 4, Olaf Vestergaard 4, Agnar Højgaard 2, Anfinn Debes 2, Hallur Danielsen 1.
Brotskøst: StÍF 4, H71 8
Útvísingar: StÍF 4, H71 2
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen og Kári Hansen

# Annika úti í fýra vikur



*Hondin kom skeivt fyri, tá Annika datt undir dysti í Vági seinasta vikuskiftið. Úrslitið var liðbandsskaði og kanska brot í handliðinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Annika Johansen hevur fingið skaða í handliðið og kann ikki spæla næstu tríggjar til fýra vikurnar**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Ein av mest týðandi spælarunum hjá Kyndlakvinnunum kann ikki spæla næstu vikurnar.

Orsøkin er, at hon hevur fingið ein skaða í handliðið. Hondin hjá Anniku Ljósstein er gipsað, og hon skal binda frið næstu vikurnar.

– Eg rokni við at fáa at vita í dag, um brot er í handliðinum, men í øllum førum hava liðbond fingið skaða, og tí kann eg ikki spæla í tríggjar ella fýra vikur, sigur Annika Ljósstein.

## Datt óheppið

Skaðin kom eftir fáar minuttir í dystinum í Vági seinasta vikuskiftið.

– Eg fór inn móti verjuni og skuldi leypa upp fyri at skjóta. Eg fekk eitt skump og skuldi lofta mær við hondunum. Eg fekk eftir øllum døma einar tveir VB-spælarar oman yvir meg, og hondin kom skeivt fyri, greiðir Annika frá.

– Eg merkti, at hondin dovnaði, men tá eg skuldi lyfta hana, hevði eg ein øgiliga pínu, so tað var einki at gera, uttan at gevast at spæla.

Í løtuni er pínan ov stór til at Annika kann halda formin við líka, men hon roknar við at fara at venja aftur í komandi viku.

# Støðan 1. deild menn

| | | dystirv | j - - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 - 0 - 0 | 118 | 82 | 36 | 8 |
| 2 | Neistin | 4 | 4 - 0 - 0 | 108 | 98 | 10 | 8 |
| 3 | H71 | 5 | 3 - 0 - 2 | 132 | 132 | 0 | 6 |
| 4 | StÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 105 | 105 | 0 | 4 |
| 5 | Kyndil | 5 | 1 - 0 - 4 | 117 | 130 | -13 | 2 |
| 6 | KÍF | 4 | 1 - 0 - 3 | 98 | 115 | -17 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 4 | 0 - 0 - 4 | 90 | 106 | -16 | 0 |